Álit

í

løgtingsmáli nr. 009/2026: Uppskot til løgtingslóg um broyting í anordning for Færøerne om euforiserende stoffer (Myndugleikaflytingar vegna yvirtøku av málsøkinum rúsandi evni)

Eyðdis Hartmann Niclasen, landsstýriskvinna í heilsu- og orkumálum, hevur lagt málið fram 24. august 2026, og eftir 1. viðgerð tann 28. august 2026 er tað beint Trivnaðarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 9. og 23. september 2026.

Undir viðgerðini av málinum hevur nevndin havt fund við landsstýriskvinnuna í heilsu- og orkumálum Eyðdis Hartmann Niclasen.

Ein samd Trivnaðarnevnd tekur undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Trivnaðarnevndin, 23. september 2026

Grímur Sundstein formaður	Sámal Petur í Grund næstformaður	Liljan Weihe
Sunnvá Dahl Høgfeldt	Magni Højgaard	Bjørt Lind
	Bjørg Brynhildardóttir Egholm	